## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og yvirhøvur turt, men seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og avfall, partvís kavi. Hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi. Kavaælingur, men mikudagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

# Borgari nr. 18.000 í Havn

**Hóskvøldið kl. 22.30 fekk Tórshavnar Kommuna sín borgara nummar 18.000. Foreldrini, Anna Dalsgarð og Jakob Jónsson, kundu errin vísa dóttrina fram fríggjamorgunin, tá ið býráðið eisini hevði okkurt at geva nýggjastu perluni í kommununi**

18.000
*Heri á Rógvi*

Í Tórshavnar Kommunu búgva nú 18.000 fólk. Tað var seint hóskvøldið, at kommunan loksins kann byrja at skriva 18.000 í síni hagtøl.

Tað eru Anna Jóannesardóttir Dalsgarð og Jakob Jónsson, sum eru foreldur at borgara nummar 18.000. Nýggjasti borgarin varð borin í heim 22. november kl. 22.30. Gentan hjá Annu og Jakob, sum enn ikki hevur fingið nakað navn, var 53 cm. long og vigaði 4.200 g.

Føðingin gekk av besta slag, og Jakob var eisini við, tá ið dóttur hansara kom í verðina saman við nýggju ommuni. Foreldrini bæði vóru kunnaði um, at hetta væl kundi fara at gerast borgari nummar 18.000, tá ið Býráðið heldur eitt vakið eyga við tølunum yvir borgararnar í kommununi.

Í sambandi við, at hesin heilt serligi borgarin varð borin í heim á Landssjúkrahúsinum, varð eisini skipað fyri samkomu, har foreldrini fingu blómur frá Tórshavnar Býráð. Jan Christiansen, borgarstjóri, hevði eisini eina líttla bronsumynd av einum nýføðingi, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt, til foreldrini og borgara nummar 18.000.

Í skrivandi stund eru tað 486 børn, ið eru borin í heim á Landssjúkrahúsinum í ár, og Jan Christiansen greiddi frá, at teir væntaðu, talið fór upp um 18.000 einaferð í summar, men fleiri fluttu av landinum, so bíðast skuldi til november mánað, áðrenn nummar 18.000 slap at síggja heimin.

Foreldrini kunnu nú gleðast yvir teirra nýggja fong, sum skal húsast millum hinar 17.999 borgararnar í Tórshavnar Kommunu.

Sosialurin ynskir foreldrunum og øðrum til lukku við barninum og alt tað besta í framtíðini.



*Borgari nummar 18.000 í Tórshavnar Kommunu, sum henda fyrsta morgunin í lívi sínum, slap at siga millum foreldrini, Annu Jóannesdótti Dalsgarð og Jakob Jónsson.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | 3 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | ÷1 |
| Lerwick | ÷1 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 11 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷4 |
| Moskva | ÷7 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 14 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 11 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 969 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvaløgini haðani vóru yvir Føroyum friggjadagin. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og dregur sum frálíður kaldari luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/11 kl. $06^{00}$ – 23/11 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 1,7°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 8,2 mm – mált frá 22/11 kl. $06^{00}$ – 23/11 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í november: 89,8 mm

**Antennu-monteringar**
Vit avgreiða allar antennu-monteringar



- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg

**Fokus ELEKTRONIK**
Reynstún 19 • Argir
Tlf. 311306 • Fax 311306

**Brúdarlín**
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281

Brúdar- og brúdargentukjólar við tilhoyri til leigu

Nýggir kjólar kunnu útvegast

## VESTFALLSKYRRINDI

22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. nov | 00.50 | 13.24 | — | 12.24 | 00.05 | 12.39 | 02.50 | 15.24 | 03.50 | 16.24 | 11.39 | — | 10.39 | 23.14 | 01.05 | 13.39 | 02.05 | 14.39 | 00.35 | 13.09 | 01.50 | 14.24 |
| 24. nov | 01.59 | 14.17 | 00.59 | 13.17 | 01.14 | 13.32 | 03.59 | 16.17 | 04.59 | 17.17 | 00.14 | 12.32 | 11.32 | 23.50 | 02.14 | 14.32 | 03.14 | 15.32 | 01.44 | 14.02 | 02.59 | 15.17 |
| 25. nov | 02.35 | 14.53 | 01.35 | 13.53 | 01.50 | 14.08 | 04.35 | 16.53 | 05.35 | 17.53 | 00.50 | 13.08 | — | 12.08 | 02.50 | 15.08 | 03.50 | 16.08 | 02.20 | 14.38 | 03.35 | 15.53 |
| 26. nov | 03.11 | 15.27 | 02.11 | 14.27 | 02.26 | 14.42 | 05.11 | 17.27 | 06.11 | 18.27 | 01.26 | 13.42 | 00.26 | 12.42 | 03.26 | 15.42 | 04.26 | 16.42 | 02.56 | 15.12 | 04.11 | 16.27 |

5 707265 100067 >